# Ævigar keldur til gleði og undran

## 2. partur

Á arbeiði okkara millum 49 svikin børn í aldrinum 0-6 ár á Christine Revell´s barnaheimi í Cape Town upplivdu vit í gerandisdegnum stórar trupulleikar og sorgarleikir, men eisini læruríkar og mennandi sannleikar. Hóast umstøðurnar arbeiddu vit millum børn, sum eru ævigar keldur til gleði, undran og íblástur, hóast framtíðarútlitini eru alt annað enn góð fyri komandi ættarliðið við vaksandi talið av HIV-smittaðum børnum

FERÐAFRÁSØGN
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Svikin, misnýtt, burturgloymd einsamøll í stórbýargøtunum, HIV-smittað… Listin er langur við teimum vanlagnum, vit hittu á einum barnaheimi í fátæka partinum av Cape Town. Ígjøgnum arbeiðsuppihald okkara frá oktober til februar á Christine Revell´s Children´s Home vóru so nógvir sorgarleikir, órættvísi og líðing savnað á einum staði, at samanlagda nøgdin av vónloysi støðugt lá til reiðar at taka valdið.

Men soleiðis var ikki. Mitt í døpru framtíðarútlitunum hjá hesum neyðars børnum hómaðu vit vón, lívsgleði og vilja til framburð, og hendingaferð stríddu sólskinssøgur seg gjøgnum gerandisligu sorgarleikirnar. Tá slíkar sólskinssøgur fræltust um, at børn høvdu fingið eina vertsfamilju, vórðu sloppin í skúla ella kundu fara heimaftur til sína egnu biologisku familju, streymaði nýggj orka gjøgnum kvinnumanningina á barnaheiminum.

### Sosialdarwinisma

Okkara uppgáva hesar 14 vikurnar var fyrst og fremst at nýta tíð saman við børnunum, veita teimum umsorgan, spæla við tey og annars taka okkum av tí tørvi, forsømdu børnini høvdu. Vit vóru einastu mannligu hjálparfólk á heiminum, og gav tað okkum eina ávísa ábyrgd at samskipa ymiskt, eldru kvinnurnar av fysiskum orsøkum ikki megnaðu.

Umframt hetta undirvístu vit av og á eldstu børnunum í grundleggjandi fakligum lærdómi. Eitt føroyskt seks ára gamalt barn dugir vanliga at tekna, skriva navn sítt o.s.fr, men við hesum børnum, sum ongan lærdóm hava fingið í stutta lívi sínum, mátti byrjast frá grundini. Tey skuldu læra at halda einum blýanti, at tekna fýrkantar, sirklar, tríkantar o.s.fr, og hetta fall fleiri av 5-6 ára gomlu børnunum sera torført. Ofta tyktist arbeiðið at styrkja um sálarliga og fakliga førleikan uttan úrslit, og børnini vóru hóast sítt stutta lív sjónliga afturúrsigld í menningargongdini.

Arbeiðsorkan hjá starvsfólkunum á heiminum rakk heldur ikki til serstaka hjálp til hvørt barnið sær, og tískil var talan millum hesi 49 børnini um eina kyniska sosialdarwinistiska "alles krig mod alle" meginreglu, har hin sterkasti yvirlivdi. Tað var syrgiligt at síggja, hvussu summi børn als ikki fótaðu sær í harðbalda umhvørvinum. Sambært hagtølunum fyri tey 49 børnini á heiminum var býtið á lívslagnum teirra hetta:

| | |
|---|---|
| HIV smittað/ávirkað | 8% |
| Foreldraleys | 5% |
| Kynsliga misbrúkt | 5% |
| Vanrøktað | 45% |
| Burturgloymd á gøtuni | 35% |
| Børn hjá tannáringum | 2% |

Børnini vórðu sostatt fødd inn í ymsar lagnur og umhvørvi, og var hetta ofta sjónligt á atferð teirra. Felags fyri flestu teirra var tó, at tey vóru desperat eftir uppmerksemi og kærleika. Tey høvdu ein øgiligan tørv á, at onkur vaksin áhaldandi nýtti tíð saman við teimum.

### HIV er nýtt apartheid

Í ársfrágreiðingini hjá barnaheiminum, vit arbeiddu á, sigur leiðarin Alicia Rhoda, at millum størstu avbjóðingarnar og krøvini, leiðslan á barnaheiminum í framtíðini stendur yvirfyri, er vaksandi trupulleikin við HIV/AIDS. Sambært ársfrágreiðingini eru fleiri og fleiri børn, sum koma á heimið, rakt ella ávirkað av sjúkuni. Christine Revell´s barnaheim hevur als ikki medisinsku útgerðina at røkja HIV-smittað børn, og liggur ein trupul framtíð fyri framman hjá teimum, sum taka sær av børnum í Cape Town og Suðurafrika.

Hóast vit dagliga arbeiddu við einstøkum HIV-smittaðum børnum, merktu vit í gerandisdegnum ikki nógv til hesa landaplágu, sum mong nevna nýggju útgávuna av apartheid. Men sannleikin er, at AIDS hevur dripið fleiri fólk í Suðurafrika, enn nakað kríggj á afrikanska meginlandinum hevur gjørt í nýggjari tíð. AIDS-sjúklingar í Suðurafrika fáa í løtuni onga viðgerð ella heilivág, og stjórnin hevur fyribils vent deyva oyranum og blinda eyganum móti tí ramaskríggi, sum fólkið hevur rópt í royndunum at ávirka myndugleikarnar.

Undir politisku apartheid skipanini, sum var galdandi frá 1948-1992, stríddust litt og svørt saman við politiska flokkinum ANC móti yvirvøldini, men nú stríðast stórir partar av ikki-hvítu íbúgvunum ímóti sama ANC flokki, tí flokkurin ikki setir neyðugu tiltøkini í verk at koma HIV-smittuni til lívs. Núverandi forsetin Thabo Mbeki hevur alment sett spurnartekin við, um HIV-smittan veruliga er orsøkin til AIDS, og við hesi útsøgn er mótstøðan móti honum og stjórnini alsamt harðnað. Í løtuni eru umleið fimm milliónir suðurafrikanar, sum eru HIV-positivir, og alt hetta hevur fingið fakfelagsrørsluna og trúðarsamfeløgini at ganga saman í felagsskapin TAC (Treatment Action Campaign) í mótmæli móti stjórnini.

- HIV er nýtt apartheid í Suðurafrika, sum í nógv størstan mun rakar svarta fólkið. Í løtuni er stjórnin versti fíggindi fólksins í stríðnum móti AIDS, tí hon als ikki tekur trupulleikan í álvara, segði biskuppurin í anglikansku kirkjuni í Suðurafrika, Njongonkulu Ndungane, á AIDS ráðstevnu í Cape Town fyri tveimum árum síðani. Ræðuliga sóttin rakar í stóran mun børnini, sum í hópatali verða fødd við smittuni. Fyrrverandi og heimskendi erkabiskuppurin í Cape Town, Desmond Tutu, hevur eisini funnist at stjórnini og ANC fyri væntandi vilja at basa sjúkuni.

- Sum trúðarsamfelag meta vit lívið, serliga lívið hjá børnunum, at vera heilagt. Framferðarhátturin hjá stjórnini er ímóti okkara grundlóg, tí fólk lata lív í hópatali. Hetta er tað sama, sum hendi undir apartheid, bert av øðrum orsøkum, segði Desmond Tutu í almennum mótmæli móti stjórnini í samband við áðurnevndu ráðstevnu. 40 prosent av øllum deyðsføllum í Suðurafrika í aldrinum frá 15-49 ár standast av AIDS, og merkir hetta, at í tíðarskeiðnum millum 2002 og 2010 doyggja millum fimm og sjey milliónir suðurafrikanskir íbúgvar í Suðurafrika av hesi sjúku. Higartil tykist stríðið móti AIDS ikki verða ovast á raðfestingarlistanum hjá stjórnini, og sera lítil partur er settur av á fíggjarlóg landsins til upplýsingartiltøk, heilivág til sjúklingar, fyribyrging o.s.fr. Ein arbeiðsbólkur í politiskari andstøðu við faklærdum fólki er komin til ta niðurstøðu, at um HIV-smittaðar møður fáa atgongd til neyðuga heilivágin frá heilsuverkinum, kann talið av HIV-smittaðum børnum fara niður í heili 50%. Umleið tíggjunda hvørt barn í Suðurafrika verður í dag føtt við HIV-smittuni, og sum áður nevnt arbeiddu vit eisini við slíkum børnum. Leiðslan á barnaheiminum hevði tó tann politikkin, at vit ikki skuldu upplýsast um, hvørji børn vóru smittað, so mismunur ikki skuldi verða framdur.

### Barnalærdómur

Ein fýra ára gomul genta á barnaheiminum sum æt C.C. (Annelisilia) fekk við samtykt frá sosialráðgeva høvi at halda jól saman við móðir síni, og skuldi hon so aftur á barnaheimið tíðliga í januar. Móðir C.C. kom ikki á heimið við henni ásetta dagin í januar, og fóru starvsfólk á heiminum tískil út í fátækrabýlingin, har móðir C.C. búði. Tá tey komu fram, var gentan horvin, meðan mamman ávirkað av rúsevnum ikki var før fyri at siga, hvar dóttir hennara var. Tá vit flugu úr Cape Town á veg heimaftur á norðaru hálvkúlu, varð C.C. eftirlýst og eftirlýsingar hongdar upp. Eingin visti, hvar fýra ára gamla gentan var. Eitt syrgiligt dømi um, hvørjum samfelagi vit høvdu livað í.

Í løtuni tykist fýra ára gamla C.C. vera horvin úr sosialu skipanini, meðan leitað verður eftir henni í Khayelitsha, størsta township øki í Cape Town. Men meðan onkur hóast alt leitar eftir henni, liva rúgvuvís av børnum eins og C.C. uttan nakran góðan, sum leitar og gevur sær far um tey. Hetta upplivdu vit í suppukøkunum, sum hvønn morgun bjóða burturgloymdum gøtubørnum í Cape Town suppu. Einsamøll í heiminum reika tey íkring uttan nakran góðan.

Men hóast tað vóru vit, sum skuldu eitast at hjálpa hesum børnum, upplivdu vit skjótt, at tað eins nógv vóru tey, sum hjálptu okkum, bara vit góvu okkum far um tað. Børnini eru nevniliga ævigar keldur til gleði, undran og íblástur. Grundleggjandi tørvur og eyðkenni í lívi barnanna sum álit uttan bakótta, óspiltur kærleiki, reint sinni, viðurkenning at tørva hjálp o.s.fr. eru at finna og læra í barndómslívinum. Tá myrku síðurnar í lívinum gera vart við seg og enntá fáa fastatøkur á einum mannalívi, stendur óspilta barnið altíð sum ein blinkandi viti og sigur: "Hygg, hvussu eg livi, ger meiri sum eg!". Hetta er av sonnum barnalærdómur, sum tíverri hevur lyndi til at drukna í vaksnamannalívsins gerandisligu trupulleikum.

Hvussu fyrireika vit við lívi og evnum okkara heimin til tey børn, sum enn ikki hava sæð dagsins ljós? Er hetta ein heimur, børn høvdu valt at verðið fødd inn í, um tey í móðurlívi høvdu fingið valmøguleikan? Hóast hypotetiskir gerast slíkir spurningar viðkomandi, tá vit hvønn dag í fýra mánaðir hava arbeitt millum børn, sum als ikki fingu neyðturviliga tørv sín nøktaðan. Tann tryggleiki, menniskjanum nýtist, er í samfeløgum sum Suðurafrika torførur at fáa eyga á, og millum børnini á heiminum sóu vit mangan, hvussu vantandi kærleiki oyðileggur og spillir unga, nælandi lívið.


*Drongurin næst uttast til vinstru kom á barnaheimið í januar mánaði, eftir at hann einsamallur varð funnin undir eini brúgv í útjaðaranum av Cape Town. Saman við honum eru uttast frá vinstru Lee Ann, Nigel og Emily, sum eru millum trý og seks ára gomul*


*Starvskvinnurnar á Christine Revell´s barnaheimi greiða og røkja hárið hjá smærru, ótolnu gentunum, meðan borðreitt verður við melónum. Bíliga fruktin varð sera nógv etin í hitanum á hásumri í Suðurafrika*


*Soleiðis eru umstøðurnar mangan eftir nógv regn í fátæku township økjunum, har flestu børnini og starvsfólkini á barnaheiminum koma frá*


*Eftir at hava arbeitt við henni hvønn dag frá fyrst í november hvarv fýra ára gamla Annelisilia (C.C.), eftir at hon hevði verið saman við móðir síni í township øki á jólum. Hvørki mamman ella nakar annar visti at siga, hvar C.C. var, og bleiv hon eftirlýst seint í januar mánaði. Her er hon, til vinstru, avmyndað á spæliplássi á jólum stutt áðrenn hon hvarv úr sosialu skipanini*